# Fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 07. september 2015

Møttir vóru: Trúgvi Gudmundarson, Rúni Thomsen, Magni Bertholdsen, Eyðfinn Debes, Martin í Nesi og Niels J. Thomsen. Jóhan Eli Poulsen var ikki heima.

Fundurin varð settur kl. 18.00.

1. **Umsókn um stuðul til "Sunnbingin á Ólavsøku 2015".**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla.

2. **Umsókn um stuðul til "Ung í Føroyum 2015" í Norðurlandahúsinum.**
   Søkt verður um stuðul til mentanarstevnu fyri ung í aldrinum 13-18 ár í Norðurlandahúsinum. Samtykt varð einmælt ikki at stuðla tiltakinum.

3. **Tilboð uppá keyp av bók um vinnulívsmannin Kjølbro.**
   Samtykt varð einmælt ikki at keypa bókina.

4. **Umsókn um stuðul til Parkinsonfelagið.**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla hesaferð, tá Hvalbiar Kommuna hevur stuðlað felagnum við kr. 5.000,- fyrr í ár.

5. **Val av limi í Kommunuvalnevndina í Hvalba fyri John Berg.**
   Í sambandi við, at John Berg hevur sagt seg frá sum lim í nevndini, varð einmælt samtykt at velja Ingibjørg Vestergaard í hansara stað. Sum eyka lim fyri Ingibjørg Vestergaard varð samtykt at velja Sunrid Olsen.

6. **Innkomin tilboð uppá gerð av neysti í Nesi.**
   Tvey feløg vórðu boðin at koma við tilboði uppá gerð av neysti í Nesi. Tilboð komu frá Sp/f Norðberg & Norðberg á kr. 619.990,00 við MVG og frá Sp/f SH-Bygg á kr. 642.165,00 uttan MVG. Samtykt varð, eftir tilmæli frá Vega- og havnanevndini í samráð við HMP Consult at taka av tí lægra tilboðnum frá Sp/f Norðberg & Norðberg.

7. **Skriv frá Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúla.**
   Fyrispurningur er komin frá kvøldskúlanum í Tórshavn í sambandi við ferðaútreiðslur hjá næmingi úr Hvalba, ið luttekur í undirvísing í føroyskum máli. Samtykt varð ikki at játta stuðul til ferðaútreiðslurnar.

**8. Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**

**9. Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

**Trivnaðarnevnd (framløga Rúni Thomsen):**

- Hjartastartarir: Í sambandi við eftirlit av hjartastartarunum, varð samtykt at taka av føstum, árligum service-tilboði frá P/F Leif Mohr uppá kr. 2.765,- fyri hvønn startara.

**Fíggjarnevnd (framløga Trúgvi Gudmundarson):**

- Lántøka: Fíggjarnevndin hevur havt fund viðvíkjandi upptøku av láni til fígging av dagstovni. Tilboð eru komin frá BankNordik og Eik Banka. Samtykt varð einmælt eftir tilmæli frá nevndini, at taka av tilboðnum frá Eik Banka, men bíða við at upptaka lánið til tørvur er á pengunum.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.30

Trúgvi Gudmundarson Rúni Thomsen Magni Bertholdsen

Eyðfinn Debes Martin í Nesi Niels Jacob Thomsen